Varðin 17. bind 1937

# At telja jólini

Tað var í gamlar dagar, at kl. 12 fastulávints sunnukvøld, tá skuldu jólini teljast, og tá skuldi hvørt barn sleppa upp í at dansa, og tað var so vorðið, at børnini sótu uppi til midnátt, til at sleppa at dansa, tá ið jólini vórðu tøld. Kl. 12 fastulávints sunnukvøld var eins og endi á dansispølunum, og tá skuldi føstan taka við, men tað varð tó altíð dansað aftan á tað, fastalávints mánakvøld varð dansað, men so tók føstan sítt.

Her norðuri kvóðu teir altíð øll fimm jólini, sum her eru prentað í tí rekkjufylgju, sum tey her koma í.

Mær gav Santa Mortan tjúguna hvørt jól…

20 stútur, nú eru jólini úti,
19 kvígur, nú munna jólini líða,
18 stakkar, nú munna jólini lækka,
17 kjólar skar hann sínum dreingjum til jólar,
16 svanur, allur vóru tranur,
15 hindur, allar vóru blindar,
14 ostur, tær falla so væl í tostur,
13 húður at tekja sínar búður,
12 droyngjur bæði við royp og stroyngjur,
11 bukkur, tær falla so væl í tukkur,
10 tunnur bjó, tá var hansara droyngjur góð,
9 longskipini rá
8 gangara frá, forgyltan saðil á,
7 silv skálir
6 øxne
5 kýr og
4 fár
3 (trý) flykkjur og
2 gæs og
1 (ein) fjøður av tann fugl, sum væl kundi at flúa.

### Santa Simeon

Stat op Santa Simeonn, Simeon var den tolvte - en…

12 vare Apostlerne
11 vare Disiplerne
10 er de ti Guds Bud
9 er vor Englekor
8 er vor Salighed
7 er vor Skabelse
6 var de Stenkar, som var sat i Kana i Galilea
5 Mosebøger
4 Evangelister
3 Patriarker, Abraham, Isak og Jakob
2 Lovens Tavler
Den ene var en Herre Gud, som regerer alle Ting.

Ville I høre og lyde til, hvad min Herre mig gav paa den tolvte Juledag…

| | |
|---|---|
| 12 | Skibe, alle med Skaale |
| 11 | Hjorte, alle traadde |
| 10 | Koner, alle med Barn |
| 9 | Køer, alle med Kalv |
| 8 | Oxer bolde,de staa alle paa Stalde, |
| 7 | Haar og |
| 6 | Faar |
| | Fimm kýr og fýra so herligar svoynar, |
| 3 | paa Korn paa min Lod |
| 2 | Fiske i en Flod |
| 1 | Høg paa min Haand og en skjøn Jomfru i min Arm og den tager ingen Mand |

Lad os le en liden Tid, i Aften var stor Glæde,
ind kom Manden, paa Sadelen vilde han træde,
Mand paa Sadel,
Sadel paa Hest,
Hest paa Ulv,
Ulv paa Ræv,
Ræv paa Gaas,
Gaas paa Hund,
Hund paa Kat,
Kat paa Mus,
Mus paa Korn,
Korn paa Sorn,
Slet forloren.

Eg kenti mær ein ríkmann,
ein ríkmann,
ein hest gav hann mær,
tummanna, tummanna, segði mín hest,
bux, bux, segði mín prest,
bøv, bøv, segði mín køv,
mæ, mær, segði mín ær,
rín, rín, segði mítt svín,
kvinki, kvinki, segði mín gás,
trú, trú, segði tranin,
kukkelarakó, segði hanin,
skrukk, segði hønan.

### Leiðbeining til kvøðingina.

Stavsetingin í hesum fimm jólunum er við vilja sett soleiðis, til at orðini skuklu verða lisin, soleiðis sum tey verða borin fram í Tjørnuvík. Enn er at siga, at í teim triðju jólunum sig teir “lide til” og ikki “lyde til”, eins og teir draga saman orðini, tá ið fyrra orðið endar og næsta orðið byrjar við sjálvljóði, t.d. í Santa Simeon: “í Kanigalilea” og í triðju jólunum “Vil i høreoglidetil.”

Øll jólini verða kvøðinj á tann hátt, at fyrst verður tikin fyrsta reglan, og síðani talt frá tí reglu, sum byrjar við 1, og so frá henni, ið byrjar við 2, og so uppeftir, til endað verður við allari rímuni, sum hon her er prentað.

Santa Mortan byrja soleiðis:

Mær gav Santa Mortan fyrsta hvørt jóla, rina fjøður av tann fugl, sum væl kundi at flúa. Mær gav Santa Mortan annað hvørt jóla tvær gæs, eina fjøður av tann fugl, sum væl kundi at flúa.

Mær gav Santa Mortan triða hvørt jóla trý flykkjur og tvær gæs og eina fjøður av tann fugl, sum væl kundi at flúa, o.s.fr.

Santa Simeon byrja teir soleiðis:

Stat op Santa Simeon, Simeon var den første – een – een var den Herre Gud, som regerer alle

Ting. Stat op Santa Simeon, Simeon var den toende – een – to Lovens Tavler, den ene var den Herre Gud, som regerer alle Ting.

Stat op Santa Simeon, Simeon var den tredje – een – tre Patriartker, Abraham, Isak og Jacob, to Lovens Tavler, den ene var den Herre Gud, som regerer alle Ting, o.s.fr.

Triðju jólini byrja teir so:

Ville I høre og lyde til, hvad min Herre gav mig paa den første Juledag: 1 Høg paa min Haand og en skjøn Jomfru i min Arm, og den tager ingen Mand. o.s.fr.

Fjórði jólini byrja teir so:

Lad os le en liden Tid, i Aften var store Glæde, ind kom Kornet, paa Sornet vilde det træde, Korn paa Sorn, slet forloren.

Lad os le en liden Tid, i Aften var stor Glæde, ind kom Musen, paa Kornet vilde den træde, Mus paa Korn, Korn paa Sorn, Slet forloren o.s.fr.

Fimti jólini byrja teir so:

Eg kenti mær ein ríkmann, ein ríkmann, eina hønu gav hann mær, skrukk segði hønan. Eg kenti mær ein ríkmann, ein ríkmann, ein hana gav hann mær, kukkularakó segði hanin, skrukk segði hønan.

**Andrass bóndi í Tjørnuvík.**

**R. Rasmussen: Sær er siður á landi, s. 147**

# Føstan og Føstusíðir

Endin á dansitíðini var Føstugangur ella Fastalávint, sum hetta tá varð kallað har í bygdini. Orðið Føstugangur varð ikki nýtt í dagligum máli, men tey eldru fólkini kendu tað tó, tí tað hevði verið havt frammi fyrr har sum aðrastaðni. Fastalávintssunnudagur varð hildin sum annar høgtíðsdagur við kirkjugangi, kjøti og súåan til døgurðar í bóndansgarði, ið hvussu var, og við brennivínsdrekka í meira lagi hjá mongum og einum.

Um kvøldið fór hópur av tí eldra fólkinum í dans, so kvøðingin var væl betri enn vanligt summukvøld. Dansað varð eisini til langt út um miðjunátt, stundum til tann ljósa morgun. Drukkið varð til yvirmát hjá mongum, og vøsan var almikil bæði úti og inni. Mánadagurin av føstugangi var ein rúsarins dagur. Menn gingu við kenning frá morgni til myrkurs, og tann siður, at sláa tunnur, var komin inn á bygdina við monum, ið høvdu verið uttanlands. Um kvøldið var aftur dansur, og tá komið var út at miðjunátt, vórðu jólini tald. Tá kom sjálvur dansiverturin uppí dansin, (hann fór annars aldri uppá gólv) og byrjaði at telja jólini: “Væl gav sankta Mortan fyrsta kvøld jóla, ein fjøður av tann fugl, ið væl dugdi at flúga!” – Væl gav Sankta Mortan annað kvøld jóla, tvær gæs og ein fjøður av tann fugl, ið væl dugdi at flúga!” – og so framvegis hvørt kvøldið jóla og síðan alt samalt oman aftur á enda uppí 20, “Væl gav Sankta Mortan tjúgunda kvøld jóla, tjúgu stútir, nú eru jólini úti!” – Hetta tók, sum vera mundi, langa tíð. Í fyrstini varð farið hóvliga fram; men alt sum jólakvøldini fjølgaåust harðnaði dansurin, og tá komið var til 12: “Væl gav Sankta Mortan tólvta hvørt jóla, tólv dreingin bæði við reip og streingir!” varð farið so harðliga fram, at sumt, ið ikki toldi nógv av, fór burtur úr og slapp sær til rímingar úr stovuni við. Tá ið komið varð til 20., var alt í einum roki, mikil róp og troðkan úr einum horni á stovuni í annað. Konufólkið gnísti og royndi at sleppa sær burtur úr, men slapp ikki. Skaði hendi tí eingin. Hetta var jú spæl. Tá úti var, var einki skil á nøkrum dansi. Nøkur fá tvarraðu enn eina stund uppi á gólvinum og royndu at telja tey sokallaðu “smáu jólini”: “Sankta, sankta Simeon”, og annað tílíkt, men dansurin var endaður. Jólini vóru úti!